

TOYOTA COROLLA 1,8 VERSO MPV 5D — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JH 349 **Km:** 107.000
**Árgangur:** 10.04.02 **Seinast sýnaður:** 20.11.06

**Kr. 122.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL SEDAN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VA 671 **Km:** 50.000
**Árgangur:** 18.06.03

**Kr. 198.000,-**



CITROEN C5 EXCLUSIVE V6 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VA 620 **Km:** 42.000
**Árgangur:** 12.06.03 **Seinast sýnaður:** 12.06.03

**Kr. 185.000,-**



TOYOTA TOYOTA CAMRY 2,2 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BS 549 **Km:** 150.000
**Árgangur:** 07.09.99

**Kr. 148.000,-**



TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT.

**Skrásetingarnr:** HG 870 **Km:** 175.000
**Árgangur:** 28.06.96

**Kr. 58.000,-**



TOYOTA AVENSIS 2,0 TD — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EH 423 **Km:** 171.000
**Árgangur:** 02.06.99 **Seinast sýnaður:** 08.06.06

**Kr. 89.000,-**



FIAT DABLO 1,2 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GT 992 **Km:** 79.000
**Árgangur:** 04.04.02

**Kr. 85.000,-**



SKODA OCTAVIA 1,6

**Skrásetingarnr:** FJ 392 **Km:** 78.000
**Árgangur:** 01.12.00 **Seinast sýnaður:** 20.08.04

**Kr. 65.000,-**



FORD FOCUS 1,6 GHIA

**Skrásetingarnr:** UV 794 **Km:** 0
**Árgangur:** 01.01.00 **Seinast sýnaður:** 24.10.05

**Kr. 75.000,-**



HONDA CIVIC 1,6 V-TEC — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FD 156 **Km:** 96.000
**Seinast sýnaður:** 26.04.06

**Kr. 108.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.


# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800



*Fimmboði Lisberg frá Sp/f Lisberg við eini Lisberg vatnfløsku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Sumbiarvatn til heimsmeistararnar

**Italsku heimsmeistararnir drukku føroysk vatn úr Sumba frá Sp/f Lisberg, meðan teir vóru her á vitjan. Sp/f Lisberg arbeiða í løtuni við eini stórari verkætlan um m.a. eina tappistøð til vatn á fløskum í Lopra**

VATN
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Meðan italsku heimsmeistararnir vóru her á vitjan, drukku teir føroyskt vatn úr Sumba í fløskum frá Sp/f Lisberg.

Fimmboði Lisberg frá Sp/f Lisberg er sera fegin um at teir fingu møguleikan at lata vatn til itlasku fótbóltsleikararnar, sum hann veit eru sera kritiskir við, hvat teir taka inn. Skotsku fótbóltsleikararnir, sum skulu spæla mikukvøldið, fáa eisini føroyskt vatn á fløskum. Vatnið, ið kemur frá ein keldu, sum verður nevnd ”Bótin”, er sera bleytt, av høgari góðsku og natúrliga reinsað í fjallinum, sigur Fimmboði Lisberg..

Sp/f Lisberg arbeiða í løtuni við eini stórari verkætlan, sum krevur eina samlaða fígging upp á upp á umleið 30. milliónir krónur. Ætlanin er m.a. at byggja eina tappistøð í Lopra, sum skal framleiða vatn á fløskum í ymiskum støddum til evropeiska marknaðin.

Í Evropa verður drukkið millum 60 og 70 milliardir litrar av fløskuvatni. Í Italia verður drukkið yvir 10 milliardir litrar av vatni á fløskum. Tað sama er galdandi fyri hini stóru londini í Evropa, sigur Fimmboði

## Fleiri koyrdu ávirkað

**Farna vikuskiftið var rættiliga friðarligt í býnum í Havn, men tó blivu heili fimm fólk tikin fyri rúsdrekkakoyring frá hóskvøldinum til í morgun, mánamorgun**

LØGREGLAN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eitt gott føroyskt úrslit á Tórsvølli ímóti italsku heimsmeistarunum hevur helst syrgt fyri, at flest øll vóru í góðum lag, tá tey fóru í býin leygarkvøldið. Løgreglan í Havn hevði nevniliga ikki tað heilt stóra at gera um vikuskiftið.

Tó so, sjáldan fer eitt vikuskiftið fram við, uttan at nakað hevur verið á vási, og soleiðis var eisini hesa ferð. Onkrir rútar blivu brotnir runt um í býnum um vikuskiftið, og sunnukvøldið bleiv ein ungur maður skuldsettur fyri politiviðtøkurnar, eftir at hann hevði blakað ein pulvursløkkjara á eitt bál úti í Sandagerði. Tá løgreglan kom á staðið vildi ungi maðurin heldur ikki upplýsa navnið, og tí mátti hann ein túr á løgreglustøðina.

### Fleiri tikin fyri rúsdrekkakoyring

Annars hevur vikuskiftið verið merkt av, at fleiri blivu tikin fyri rúsdrekkakoyring. Hetta byrjaði longu nakað eftir midnátt hóskvøldið, tá ein maður bleiv steðgaður í Vestmanna fyri rúsdrekkakoyring.

Nakað eftir kl. 20 fríggjakvøldið bleiv ein bilur steðgaður í miðbýnum í Havn, og førarin bleiv tikin fyri at koyra ávirkaður. Hetta gjørdist tó ikki seinastu ferð hetta kvøldið, at løgreglan steðgaði fólki fyri rúsdrekkakoyring.

Klokkan knapp fýra um náttina bleiv ein bilur steðgaður á Hoyvíksvegnum, har førarin bleiv tikin fyri rúsdrekkakoyring, og lítla løtu seinni bleiv ein annar bilur steðgaður á Ringvegnum, har førarin eisini var ávirkaður.

Í morgun bleiv enn ein bilur steðgaður á Eystaru Bryggju í Havn. Førarin var júst komin heim við Norrønu, og hann var ávirkaður, tá hann kom í land við bilin. Eisini hesin bleiv tikin av løgregluni.

So ígjøgnum alt vikuskiftið eru heili fimm fólk tikin fyri at koyra ávirkaði.